BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

28. juni 2023
Mál: 22/22133- 40
Viðgjørt: JáR

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208
110 Tórshavn

Svar

upp á

§ 52 a fyrispurning 52-122/2022 um avsláttur í ferðaseðlaprísum fyri lærlingar, frá Hans Jacob Thomsen, løgtingsmanni, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at avsláttarkort hjá SSL eisini skal fevna um lærlingar og ikki einans lesandi?
2. Um so er, nær ætlar landsstýrismaðurin at seta hetta í verk?

Svar

Til 1: Eingin ítøklig ætlan fyriliggur um at seta hetta í verk. Sambært lestrarstuðulslógini § 4, er ein fortreyt fyri at fáa lestrarstuðul, íroknað ferðastuðul, at útbúgvingin er ólønt. Grundleggjandi kann sigast, at lærlingar taka útbúgving sína eftir øðrum fíggjarligum fyritreytum enn lesandi gera. Lærlingar hava lærusáttmála og fáa løn undir útbúgvingini sambært galdandi sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum. Og er hendan løn væl hægri enn lestrarstuðulin er. Harvið er ikki sagt, at avsláttarkortið hjá SSL ikki eisini kundi fevnt um lærlingar, men hetta krevur eina neyvari tørvslýsing og viðger, umframt nýggja lógarheimild um so skal vera.

Til 2: Landssýrismaðurin ætlar at viðgera spurningin nærri saman við umsitingini. Ein møguleiki í hesum sambandi er eisini at viðgera spurningin saman við Yrkisútbúgvingarráðnum, har arbeiðsmarknaðarpartarnir hava sína umboðan. Yrkisútbúgvingarráðið er tilmælandi til landsstýrismannin á yrkisútbúgvingarøkinum sambært yrkisútbúgvingarlógini.

Vinarliga heilsan

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður